Mai 2025

betri pensjón

Tryggingartreytir

# Bráðsjúku-trygging

# Bráðsjúkutrygging

*Tryggingartreytirnar eru galdandi frá 1. mai 2025 og koma ístaðin fyri treytirnar, sum komu í gildi tann 1. juni 2016.*

**A. Nøkur orð um tryggingina 4**

**B. Lógargrundarlag 4**

**C. Felags treytir 4**

10.00 Almennar treytir 4
10.10 Hvør er tryggjaður 4
10.20 Nær tekur tryggingin við 4
10.30 Avmarkingar, áðrenn tryggingin kemur í gildi 4
10.40 Avmarkingar, meðan tryggingin er í gildi 5
10.50 Fráboðan 5
11.00 Dagføring av sjúkulistum 5
12.00 Bráðsjúkur fyri vaksin og børn 6

**D. Nærri lýsing av bráðsjúkunum fyri vaksin 7**

15.00 Krabbamein – undantikið minni ágangandi sløg 7
16.00 Krabbamein í blóði, lymfu og blóðgerandi kyknunum í merginum – undantikið minni ágangandi (indolent) sløg 7
17.00 Ávísir góðkynjaðir og minni ágangandi svullir í heila ella mønu 8
18.00 Heilabløðing ella blóðtøppur í heilanum (apopleksi) 8
19.00 Posi á lívæðr í heilanum (aneurisma) ella karvanskapan inni í heilanum (AV-malformatión ella kavernøst angiom) – har tørvur er á skurðinntrivi 8
20.00 Blóðtøppur í hjartanum (myokardieinfarkt) 9
21.00 By-pass skurðviðgerð (CABG) ella PCI-viðgerð vegna treinging í hjartaæðri 9
22.00 Varandi hjartaviknan 9
23.00 Hjartaloku-skurðviðgerð 10
24.00 Ísetan av hjartastoytara (ICD-eind) orsakað av lívshóttandi rútmuórógvi 10
26.00 Varandi nýrasvignan 10
27.00 Størri gøgntransplantatión 10
28.00 Sjúka í aorta (meginlívæðrini) 10
30.00 Multipel (dissemineráð) sklerosa (MS) 11
31.00 Amyotrofisk lateralsklerosa (ALS) ella aðrar líknandi progressivar ikki-arvaligar motorneuron sjúkur (MND) 11
32.00 Primer Parkinsons (paralysis agitans) 11
33.00 Ávísar vødda- og nervasjúkur 12
34.00 Alzheimers sjúka 12
35.00 HIV-ígerð, borin av blóðflutningi ella arbeiðstreytaðari smittu 12
36.00 AIDS 12
37.00 Veruligt blindni 12
38.00 Totalur deyvleiki 13
39.00 Størri brunasár av 3. ella 4. stigi (ambustio) 13
40.00 Varandi neurologiskar fylgjur eftir bruna í heila- ella heilahinnum, neuroborreliosa og Tick-Borne-Encephalitis (TBE) 13
41.00 Creutzfeldt-Jakobs sjúka (CJD og vCJD) 13

**E. Nærri lýsing av bráðsjúkunum fyri børn 14**

115.00 Krabbamein – undantikið minni ágangandi sløg 14
116.00 Krabbamein í blóði, lymfu og blóðgerandi kyknunum í merginum – undantikið minni ágangandi (indolent) sløg 14
117.00 Ávísir góðkynjaðir og minni ágangandi svullir í heila ella mønu 15
118.00 Heilabløðing ella blóðtøppur í heilanum (apopleksi) 15

# Bráðsjúkutrygging

*Tryggingartreytirnar eru galdandi frá 1. mai 2025 og koma ístaðin fyri treytirnar, sum komu í gildi tann 1. juni 2016.*

119.00 Posi á lívæðr í heilanum (aneurisma) ella karvanskapan inni í heilanum (AV-malformatión ella kavernøst angiom) – har tørvur er á skurðinntrivi 15

120.00 Ring (kompleks) hjarta- ella aortasjúka, har tørvur er á skurðinntrivi, og tilburðir har tørvur er á betran av pumpu- ella rútmufunktión í hjartanum við ísetan av framkomnari pacemaker-skipan ella ICD 16

121.00 Varandi nýrasvignan 16

122.00 Størri gøgntransplantatión 16

123.00 Multipel (dissemineráð) sklerosa (MS) 16

124.00 HIV-ígerð ella AIDS 17

125.00 Veruligt blindni 17

126.00 Totalur deyvleiki 17

127.00 Størri brunasár av 2. ella 3. stigi (ambustio) 17

128.00 Varandi neurologiskar fylgjur eftir bruna í heila- ella heilahinnum, neuroborreliosa og Tick-Borne-Encephalitis (TBE) 17

129.00 Ringt viðgerðarkrevjandi generaliserað epilepsi 18

130.00 Trygging við deyða 18

# Bráðsjúkutrygging

## A. Nøkur orð um tryggingina

Bráðsjúkutryggingin tryggjar teg og tíni børn (frá føðing og fram til tey fylla 18 ár), um tit verða rakt av bráðsjúku.
Í hesum treytum sæst, hvørjar sjúkur eru umfataðar av tryggingini.
Rita inn á www.pensjón.fo og hygg, um tín trygging er soleiðis, sum tú vilt hava hana.

## B. Lógargrundarlag

Fyri tryggingina eru galdandi, umframt hesar tryggingartreytir, møguligar sertreytir, viðtøkur felagsins og tær í Føroyum galdandi lógir um tryggingaravtalur og tryggingarvirksemi og føroysk lóggáva annars.

## C. Felags treytir

### 10.00 Almennar treytir

**10.01** Umframt hesar tryggingartreytir, eru almennu tryggingar-treytirnar hjá Betri Pensjón eisini galdandi.

**10.02** Bráðsjúkutryggingin fevnir um tær sjúkur/ sjúkuavgerðir (diagnosur), skurðviðgerðir, skurðinntriv og fylgjur, ið eru nevndar í grein 15.00 - 41.00 fyri vaksin og grein 115.00 – 130.00 fyri børn. Sjúkur, skurðviðgerðir, skurðinntriv og fylgjur av sjúku verða hereftir nevndar sum sjúkuavgerðir.

**10.03** Sjúkuavgerð, ið er staðfest áðrenn 01.05.2025, verður viðgjørd eftir tryggingartreytunum, ið tá vóru galdandi. Somuleiðis er tað tryggingarupphæddin, sum var galdandi tann dagin, tá sjúkuavgerðin varð staðfest, sum verður útgoldin.

**10.04** Gildistíð og tryggingarupphædd eru ásettar í tryggingaravtaluni. Tryggingarupphæddin verður útgoldin til tryggjaða.

**10.05** Um tryggjaði doyr, verður útgjaldið fyri bráðsjúku ikki mótroknað møguligum útgjaldi frá eini lívstrygging.

### 10.10 Hvør er tryggjaður

**10.11** Tryggjaði er tann, ið er nevndur í tryggingaravtaluni.

**10.12** Tryggingin fevnir eisini um børn hjá tryggjaða. Hesi eru egin børn og fosturbørn frá føðing og fram til tey fylla 18 ár. Fosturbørn, treytað av, at hesi eru skrásett at búgva á sama bústaði sum tryggjaði.

### 10.20 Nær tekur tryggingin við

**10.21** Tryggingin fevnir um sjúkuavgerðir, sum eru staðfestar, meðan tryggingin er í gildi. Tað er tó ein treyt, at tryggingin hevur verið í gildi í minsta lagi 1 mánaða.
Sjúkuavgerðir, ið eru staðfestar eftir, at tryggingin er farin úr gildi, eru ikki fevndar av hesi trygging.

**10.22** Tað er tíðspunktið, tá sjúkuavgerðin varð staðfest, ið er avgerandi fyri, um tryggingin tekur við, og ikki tíðspunktið, tá tryggjaði fekk kunnleika um sjúkuavgerðina.

**10.23** Rættindi til útgjald fyri bráðsjúku hjá barni koma í gildi, um barnið fær staðfest eina av nevndu sjúkuavgerðunum ella doyr, meðan tryggingin er í gildi. Tað er ein treyt fyri útgjaldi, at barnið er livandi føtt og liviført.

### 10.30 Avmarkingar, áðrenn tryggingin kemur í gildi

**10.31** Hevur tryggjaði, ella barn hjá tryggjaða, áðrenn tryggingin er komin í gildi, fingið staðfest ella verið í viðgerð fyri eina av bráðsjúkunum, fæst útgjald ikki fyri hesa sjúku.

**10.32** Hevur tryggjaði, áðrenn tryggingin er komin í gildi, fingið staðfest ella verið í viðgerð fyri eina av bráðsjúkunum í grein 18.00, 19.00, 20.00, 21.00, 22.00, 23.00 ella 24.00, fæst ikki útgjald fyri nakra av hesum sjúkunum.

# Bráðsjúkutrygging

**10.33** Hevur tryggjaði, áðrenn tryggingin er komin í gildi, fingið staðfest ella verið í viðgerð fyri sjúkuna 'HIV-ígerð' (grein 35.00), fæst ikki útgjald fyri sjúkuna 'AIDS' (grein 36.00).

### 10.40 Avmarkingar, meðan tryggingin er í gildi

**10.41** Hevur tryggjaði eina ferð fingið útgjald fyri eina bráðsjúku, fæst ikki útgjald fyri somu sjúku ella aðrar sjúkur undir somu grein.

**10.42** Hevur tryggjaði fyrr fingið staðfest sjúkuavgerð ella verið í viðgerð fyri krabbasjúku eftir grein 15.00 ella grein 16.00, fæst eftir hesum greinum útgjald fyri aðra primera krabbasjúku, treytað av, at 7 ár eru liðin, síðan seinasta viðgerð er endað (td. kemoviðgerð, stráluviðgerð, skurðviðgerð o.s.fr.), og til nýggja sjúkuavgerðin er staðfest. Hevur tryggjaði fyrr fingið staðfest meira enn eina krabbasjúku eftir grein 15.00 ella grein 16.00, fæst einki útgjald.

**10.43** Hevur tryggjaði eina ferð fingið útgjald fyri eina av bráðsjúkunum í grein 18.00, 19.00, 20.00, 21.00, 22.00, 23.00 ella 24.00, fæst ikki útgjald fyri hesar sjúkur.

**10.44** Hevur tryggjaði fingið útgjald fyri sjúkuna 'HIV-ígerð' (grein 35.00), fæst ikki útgjald fyri sjúkuna 'AIDS' (grein 36.00).

**10.45** Tað er ein treyt fyri meira enn einum útgjaldi, at tað eru gingnir í minsta lagi 6 mánaðir, síðani seinastu sjúkuavgerð, sum gav rætt til útgjald. Um so er, at tryggjaði kemur á bíðilista til skurðviðgerð, verður 6 mánaða skeiðið roknað fram til dagin, tá skurðviðgerðin verður framd.

**10.46** Útgjald fyri bráðsjúku fæst eina ferð fyri hvørt barn hjá tryggjaða. Um barnið doyr, kunnu tó í ávísum føri tvey útgjøld verða veitt, sí grein 130.00.

### 10.50 Fráboðan

**10.51** Rætturin til útgjald fyri bráðsjúku fellur burtur, um tryggjaði doyr, uttan so, at tað er skrivliga boðað frá um sjúkuna, áðrenn tryggjaði doyði.

**10.52** Rætturin til útgjald fyri bráðsjúku hjá barni fellur burtur, um barnið doyr, uttan so, at tað er skrivliga boðað frá um sjúkuna, áðrenn barnið doyði.
Hendan ásetingin er tó ikki galdandi fyri grein 130.00.

**10.53** Er avtalan millum tryggjaða og Betri Pensjón uppsøgd ella av øðrum orsøkum farin úr gildi, skal skrivlig áheitan um útgjald vera latin Betri Pensjón í seinasta lagi 6 mánaðir aftaná, at tryggingin er farin úr gildi. Aftaná hesa freist fellur rætturin til útgjald fyri bráðsjúku, sum ikki er fráboðað, burtur.

### 11.00 Dagføring av sjúkulistum

**11.01** Yvirlitini í grein 12.00 vísa á galdandi sjúkulistar. Í bólki D og bólki E verða sjúkurnar nærri lýstar, og greitt verður frá, hvat tryggingin fevnir um, og hvat tryggingin ikki fevnir um. Hesi yvirlit verða javnan dagførd, so hvørt sum vitanin um ymsu sjúkurnar verður betri.

**11.02** Yvirlitini eru millum annað grundað á árligt tilmæli frá servitanini á økinum. Hetta merkir, at bráðsjúkurnar kunnu broytast leypandi, meðan tryggingin er í gildi.

betri pensjón

# Bráðsjúkutrygging - *yvirlit*

### 12.00 Bráðsjúkur fyri vaksin og børn

**12.01** Niðanfyri eru yvirlitini yvir bráðsjúkurnar fyri vaksin og børn. Nærri lýsing av hesum sjúkunum sæst í bólki D og bólki E.

| Grein | Yvirlit – vaksin |
|---|---|
| 15.00 | Krabbamein – undantikið minni ágangandi sløg |
| 16.00 | Krabbamein í blóði, lymfu og blóðgerandi kyknunum í merginum – undantikið minni ágangandi sløg |
| 17.00 | Ávísir góðkynjaðir og minni ágangandi svullir í heila ella mønu |
| 18.00 | Heilabløðing ella blóðtøppur í heilanum (apopleksi) |
| 19.00 | Posi á lívæðr í heilanum (aneurisma) ella karvanskapan inni í heilanum (AV-malformatión ella kavernøst angiom) – har tørvur er á skurðinntrivi |
| 20.00 | Blóðtøppur í hjartanum (myokardieinfarkt) |
| 21.00 | By-pass skurðviðgerð (CABG) ella PCI-viðgerð vegna treinging í hjartaæðr |
| 22.00 | Varandi hjartaviknan |
| 23.00 | Hjartaloku-skurðviðgerð |
| 24.00 | Ísetan av hjartastoytara (ICD-eind) orsakað av lívshóttandi rútmuórógvi |
| 26.00 | Varandi nýrasvignan |
| 27.00 | Størri gøgntransplantatión |
| 28.00 | Sjúka í aorta (meginlívæðrini) |
| 30.00 | Multipel (dissemineráð) sklerosa (MS) |
| 31.00 | Amyotrofisk lateralsklerosa (ALS) ella aðrar líknandi progressivar ikki-arvaligar motorneuron sjúkur (MND) |
| 32.00 | Primer Parkinsons (paralysis agitans) |
| 33.00 | Ávísar vødda- og nervasjúkur |
| 34.00 | Alzheimers sjúka |
| 35.00 | HIV-ígerð, borin av blóðflutningi ella arbeiðstreytaðari smittu |
| 36.00 | AIDS |
| 37.00 | Veruligt blindni |
| 38.00 | Totalur deyvleiki |
| 39.00 | Størri brunasár av 3. ella 4. stigi (ambustio) |
| 40.00 | Varandi neurologiskar fylgjur eftir bruna í heila- ella heilahinnum, neuroborreliosa og Tick-Borne-Encephalitis (TBE) |
| 41.00 | Creutzfeldt-Jakobs sjúka (CJD og vCJD) |

| Grein | Yvirlit – børn |
|---|---|
| 115.00 | Krabbamein – undantikið minni ágangandi sløg |
| 116.00 | Krabbamein í blóði, lymfu og blóðgerandi kyknunum í merginum – undantikið minni ágangandi sløg |
| 117.00 | Ávísir góðkynjaðir og minni ágangandi svullir í heila ella mønu |
| 118.00 | Heilabløðing ella blóðtøppur í heilanum (apopleksi) |
| 119.00 | Posi á lívæðr í heilanum (aneurisma) ella karvanskapan inni í heilanum (AV-malformatión ella kavernøst angiom) – har tørvur er á skurðinntrivi |
| 120.00 | Ring (kompleks) hjarta- ella aortasjúka, har tørvur er á skurðinntrivi, og tilburðir har tørvur er á betran av pumpu- ella rútmufunktión í hjartanum við ísetan av framkomnari pacemaker-skipan ella ICD |
| 121.00 | Varandi nýrasvignan |
| 122.00 | Størri gøgntransplantatión |
| 123.00 | Multipel (dissemineráð) sklerosa (MS) |
| 124.00 | HIV-ígerð ella AIDS |
| 125.00 | Veruligt blindni |
| 126.00 | Totalur deyvleiki |
| 127.00 | Størri brunasár av 2. ella 3. stigi (ambustio) |
| 128.00 | Varandi neurologiskar fylgjur eftir bruna í heila- ella heilahinnum, neuroborreliosa og Tick-Borne-Encephalitis (TBE) |
| 129.00 | Ringt viðgerðarkrevjandi generaliserað epilepsi |
| 130.00 | Trygging við deyða |

# Bráðsjúkutrygging - *vaksin*

## D. Nærri lýsing av bráðsjúkunum fyri vaksin

**15.00 Krabbamein – undantikið minni ágangandi sløg**

**15.01** Illkynjaður (malignur) svullur (tumor), har sjúkuavgerðin er staðfest histologiskt, sermerktur við ótálmaðum vøkstri av illkynjaðum kyknum, sum hevur lyndi til at spreiða seg inn í vevnaðin uttanum og hevur lyndi til lokalt afturstig (recidiv) og harumframt eisini lyndi til at spreiða seg til aðrar lymfueitlar og onnur gøgn (metastasur).

**15.02 Tryggingin fevnir ikki um:**

**a)** Svullir flokkaðir á byrjunarstigi, non-invasivir, karcinom in situ, dysplasi, borderline ella við lágum illkynjaðum menningarmøguleikum (uttan mun til, hvør viðgerð er vald).

**b)** Øll sløg av húðkrabba (íroknað lymfomir og sarkomir í húðini) og móðurmerkjakrabbi á stigi 0 og 1A (malignt melanom).

**c)** Kaposi's sarkom.

**d)** Bløðrupapillom.

**e)** Neuroendokrinir (karcinoide) svullir uttan lyndi til spreiðing inn í vevnaðin uttanum ella metastasur.

**f)** Prostatakrabbi við einum Gleason-tali á 6 ella minni (kliniskt stig svarandi til T2aN0M0 ella minni).

**15.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá ein serlækni í vevnaðarkanningum (patologi) hevur staðfest sjúkuavgerðina grundað á histologiska kanning av tumorvevnaðinum.

**16.00 Krabbamein í blóði, lymfu og blóðgerandi kyknunum í merginum – undantikið minni ágangandi (indolent) sløg**

**16.01** Illkynjað (malign) sjúka íkomin í blóði, lymfu ella blóðgerandi kyknunum í merginum, eyðkend við atypiskum blóðbílæti við ótálmaðum vøkstri av blóðkyknum og lyndi til progressión og afturstig (recidiv).

**16.02 Tryggingin fevnir um:**

**a)** Akut leukæmi.

**b)** Kronisk myeloid leukæmi (CML).

**c)** Myelomatose/solitært myelom og Waldenströms makroglobulinæmi.

**d)** Non-Hodgkins lymfom, ***undantikið*** minni ágangandi sløg sum; lokaliserað MALT lymfom, mycosis fungoides á plaque-stigi og húðlymfomir sum lokaliserað CD30 positivt lymfom og kutant B-kyknu lymfom lokaliserað til húðina.

**e)** Hodgkins lymfom á II til IV stigi.

**f)** Myelodysplastisk syndrom (MDS) við høgum váða (højrisiko).

**g)** Kronisk myelomonocytær leukæmi (CMML).

**16.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá serlækni í vevnaðarkanningum (patologi) hevur kannað og staðfest sjúkuavgerðina grundað á histologiskar ella cytologiskar kanningar, og hartil møguligar mýlalívfrøðisligar (molekylær-biologisk) upplýsingar grundaðar á blóð og merg.

**16.04 Tryggingin fevnir eisini um viðgerðarkrevjandi*:**

**a)** Kronisk lymfatisk leukæmi (CLL)/ småcellet lymfocytært lymfom (SLL).

**b)** Essentiel trombocytosa.

**c)** Polycytæmia vera.

**d)** Myelofibrosa.

*Viðgerðarkrevjandi merkir kyknudrepandi viðgerð (íroknað kemoviðgerð og aðrar málrættaðar (targeteret) krabba-meinsviðgerðir) ella stráluviðgerð og eisini transplantatión við upprunakyknum (autolog mergtransplantatión) ella mergi frá øðrum gevara (allogen mergtransplantatión).

**16.05** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá serlækni í vevnaðarkanningum (patologi) hevur kannað og staðfest sjúkuavgerðina grundað á histologiskar ella cytologiskar kanningar, og hartil møguligar mýlalívfrøðisligar (molekylær-biologisk) upplýsingar grundaðar á blóð og merg – **og** tað frá onkologiskari ella hematologiskari deild er skrivað í journalin, at tað er viðgerðarindikatión fyri kyknudrepandi viðgerð, stráluviðgerð ella transplantatión av upprunakyknum ella mergi frá gevara.

**16.06 Tryggingin fevnir ikki um:**

**a)** Byrjunarstøður til krabbamein í blóði, lymfu og blóðgerandi kyknunum í merginum.

**b)** Lymfomir staðbundin til húðina.

**c)** Monoklonal gammopati (MGUS).

# Bráðsjúkutrygging - *vaksin*

### 17.00 Ávísir góðkynjaðir og minni ágangandi svullir í heila ella mønu

**17.01** Góðkynjaður ella minni ágangandi (stig 1-2) svullur (tumor) íkomin og sprottin frá heila, heilarunni, mønu ella í hinnum hjá hesum gøgnum (miðnervalagið).

**17.02** Dekningurin er treytaður av, at tilburðurin hevur ført við sær munandi objektivar neurologiskar fylgjur (td. dysfunktión og niðursettar førleikar) svarandi til í minsta lagi 10% mein eftir meintalvuni hjá Arbejdsmarkedets Erhvervssikring. Kenslubornar fylgjur, kognitivur ampi, høvuðpína ella møði er ikki fevnt av tryggingini.

**17.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá ein neurologisk ella neurokirurgisk deild hevur staðfest sjúkuavgerðina, og ein serlækni í neurologi hevur váttað objektivu neurologisku fylgjurnar og útilokað aðrar orsøkir til fylgjurnar.

**17.04 Tryggingin fevnir ikki um:**

**a)** Svullir í skalla-/heilanervum ella spinalnervum (herundir Schwannomir/neurinomir).

**b)** Granulomir ella isoleraðar cystur uttan maligna patologi.

**c)** Hypofysuadenomir.

### 18.00 Heilabløðing ella blóðtøppur í heilanum (apopleksi)

**18.01** Brádligt (akutt) íkomin løstur í heila ella heilarunni orsakað av órógvi í blóðrenslinum í heilanum (apopleksi), sum antin stavar frá;

**a)** eini treinging ella typping av eini lívæðr (pulsåre) íkomin í heilanum orsakað av trombosu ella emboli, og samstundis íkomin objektiv neurologisk sjúkueyðkenni, sum hava verið tilstaðar í meira enn 24 tímar, ***ella***

**b)** ein spontant ella traumatiskt íkomin bløðing í heilanum ella millum heilahinnurnar, og samstundis íkomin objektiv neurologisk sjúkueyðkenni.

**18.02 Dekningurin er treytaður av:**

**a)** at tilburðurin er skjalprógvaður við heilaskanning (CT/MR) ***og***

**b)** at tilburðurin hevur ført við sær varandi neurologiskar fylgjur (kann í fyrsta lagi metast eftir ein mánaða) so sum lamni, niðursetta styrki ella sensibilitet, talu- ella sjónarórógv svarandi til heilaskaðan, sum er ávístur við heilaskanning.
Kenslubornar fylgjur, kognitivur ampi, høvuðpína ella møði er ikki fevnt av tryggingini.

**18.03** Tryggingin fevnir harumframt um størri blóðtøpp í heilanum, tá tað eru nóg greið klinisk tekin til, at ein serlækni í neurologi hevur staðfest sjúkuavgerðina uttan skjalprógv við myndum (íroknað tilburðir, har heilaskanningin (CT/MR) ikki er eintýdd ella ikki er gjørd), um tað ein mánaða aftaná tilburðin framvegis eru varandi neurologiskar fylgjur so sum lamni, niðursett styrki ella sensibilitet, talu- ella sjónarórógv. Kenslubornar fylgjur, kognitivur ampi, høvuðpína ella møði er ikki fevnt av tryggingini.

**18.04** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá neurologisk ella neurokirurgisk deild hevur staðfest sjúkuavgerðina apopleksi **og** serlækni í neurologi hevur váttað varandi neurologisku fylgjurnar, og samstundis hevur útilokað aðrar orsøkir til neurologisku fylgjurnar.

**18.05 Tryggingin fevnir ikki um:**

**a)** Skjótt forbí farandi blóðtøppar (transitorisk cerebral iskæmi (TCI/TIA)).

**b)** Áður hent heilainfarkt ávíst við heilaskanning (CT/MR).

**c)** Blóðtøppar ella bløðingar í útryðjuni (perifere) av nervavevnaðinum, tað vil siga uttan fyri heilan (t.d. í eygunum, oyrunum, hypofysuni).

### 19.00 Posi á lívæðr í heilanum (aneurisma) ella karvanskapan inni í heilanum (AV-malformatión ella kavernøst angiom) – har tørvur er á skurðinntrivi

**19.01** Ætlað ella framt endovaskulert ella annað kirurgiskt inntriv vegna brek í æðrum í heilanum orsakað av;

**a)** einum ella fleiri posum á lívæðrum í heilanum ***ella***

**b)** arteriovenøs karvanskapan (karmisdannelse) ***ella***

**c)** kavernøst angiom.

**19.02** Dekningurin er treytaður av, at sjúkuavgerðin er staðfest á neurologiskari ella neurokirurgiskari deild og brekið er skjalprógvað við myndum (CT- ella MR-skanning).

**19.03** Tryggingin fevnir harumframt um tilburðir, har tørvur er á kirurgiskum inntrivi, men viðgerðin ikki kann gjøgnumførast av tekniskum ella øðrum orsøkum.

# Bráðsjúkutrygging - *vaksin*

**19.04** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin á skurðviðgerðardegnum ella á degnum, tá tryggjaði er góðkendur á bíðilista. Er skurðviðgerðin ikki tekniskt møgulig, verður sjúkuavgerðin mett sum tikin tann dagin, har tað er skrivað í journalin frá neurologiskari ella neurokirurgiskari deild, at tað er skurðviðgerðarindikatión, men at skurðviðgerðin ikki er tekniskt møgulig.

### 20.00 Blóðtøppur í hjartanum (myokardieinfarkt)

**20.01** Brádligt (akutt) virkisloysi (nekrose) av parti av vøddavevnaði í hjartanum orsakað av vantandi ella ónøktandi blóðtilførslu til tann partin av hjartanum, og sum hevur ført við sær skaða á hjartavøddan og niðursetta pumpufunktión (LVEF) til 50% ella minni.

**20.02** Sjúkuavgerðin skal skjalprógvast og grundast á:

**a)** Eina greiða og eintýdda sjúkuavgerðarliga hækkan og/ella lækkan av kardialum biomarkørum (serliga troponin I og T), har minst eitt virði er greitt sjúkuavgerðarligt hækkað (omanfyri 99%-percentilen), og samstundis, at ***í minsta lagi ein av fylgjandi treytum er uppfylt:***

**b)** Hjávera av sermerktum kliniskum sjúkueyðkennum fyri akut iskæmi so sum bringupína, trongd (dyspnø) ella rútmuórógv (arytmi).

**c)** EKG-broytingar, ið benda á nýliga íkomið iskæmi, so sum nýggjar ST-broytingar, inverteraðar T-takkir ella nýggj greinablokada í vinstru síðu.

**d)** Sjúkuavgerðarligt prógv (MR-skanning ella ekkokardiografi) fyri nýliga íkomnum virkisloysi av hjartavøddavevnaði við LVEF á 50% ella minni.

**e)** Identifikatión av eini 'intrakoronar trombe' við koronarangiografi (KAG).

**20.03** Sjúkuavgerðin, myokardieinfarkt, verður mett sum tikin, tá omanfyrinevndu treytir eru uppfyltar, og serlækni í kardiologi hevur staðfest sjúkuavgerðina blóðtøppur í hjartanum (myokardieinfarkt).

**20.04 Tryggingin fevnir ikki um:**

**a)** AKS uttan greið sjúkuavgerðarlig tekin til myokardienekrose.

**b)** Myokardieinfarkt í sambandi við PCI ella CABG (typa 4 og 5).

### 21.00 By-pass skurðviðgerð (CABG) ella PCI-viðgerð vegna treinging í hjartaæðr

**21.01** Revaskulerandi viðgerð, orsakað av krúnulívæðra-kálking, av sløgunum;

**a)** ein framd PCI-viðgerð á eina ella fleiri av krúnulívæðrunum í hjartanum ella

**b)** ein ætlað ella framd opin hjartakirurgisk by-pass skurðviðgerð (CABG) á eina ella fleiri av krúnulívæðrunum í hjartanum.

**21.02** Er ætlan um skurðviðgerð, skal tryggjaði vera góðkendur á bíðilista til CABG. Er talan um PCI-viðgerð, skal viðgerðin vera framd.

**21.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin á degnum, tá PCI-viðgerðin ella skurðviðgerðin er framd ella á degnum, tá tryggjaði er góðkendur á bíðilista til CABG.

**21.04** Tryggingin fevnir harumframt um ringar aterosklerotiskar tilburðir, har indikatión er fyri PCI-viðgerð orsakað av skjalprógvaðari ringari aterosklerosu á eina ella fleiri krúnulívæðrar í hjartanum, men viðgerðin ikki kann gjøgnumførast av tekniskum ella øðrum orsøkum.

### 22.00 Varandi hjartaviknan

**22.01** Varandi (kronisk) hjartaviknan við álvarsligum sjúkueyðkennum ella virkisligari avmarking í hvílu ella vanligari gongd, svarandi til NYHA III-IV, hóast nóg mikið av medisinskari viðgerð í meira enn 6 mánaðir, har støðan stendst av antin;

**a)** hjartaviknan vinstru megin, har úttømingarlutfalli í vinstra ventrikli (LVEF) er niðursett til 35% ella niðanfyri ***ella***

**b)** hjartaviknan høgru megin, har tað er ávíst pulmonal arterial hypertensión bólkur 1 (PAH1) við einari hjartakateterisatión høgru megin.

**22.02** Tryggingin fevnir harumframt um tilburðir har tað, orsakað av ringari hjartaviknan vinstru megin við álvarsligum sjukueyðkennum ella virkisligari avmarking í hvílu og vanligari gongd (tvs. við NYHA III-IV), er ætlan um ella framd skurðísetan av;

**a)** einari framkomnari pacemaker-skipan (biventrikulær ICD ella biventrikulær pacemaker (CRT-eind)) ***ella***

**b)** ein LVAD (HeartMate ella annar varandi mekaniskur hjartastuðul)

# Bráðsjúkutrygging - *vaksin*

**22.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá omanfyri nevndu treytir eru uppfyltar, og sjúkuavgerðin er staðfest av serlækna í kardiologi ella á einari kardiologiskari deild. Við skurðísetan av framkomnum pacemaker ella LVAD verður sjúkuavgerðin mett sum tikin á skurðviðgerðardegnum ella á degnum, tá tryggjaði er góðkendur á bíðilista.

**22.04** Tryggingin fevnir ikki um skurðísetan av vanligum pacermaker (kvikli).

### 23.00 Hjartaloku-skurðviðgerð

**23.01** Ætlað ella framd hjartakirurgisk viðgerð fyri hjartalokubrek (treinging ella leki), við ísetan av mekaniskari ella lívfrøðisligari hjartalokuprotesu ella framt lokuplastikk.

**23.02** Tryggingin fevnir harumframt um framda perkutan útskifting ella umvæling av aortaloku (TAVI) ella mitralloku (MitralClip ella líknandi).

**23.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin á skurðviðgerðar-degnum ella á degnum, tá tryggjaði er góðkendur á bíðilista.

### 24.00 Ísetan av hjartastoytara (ICD-eind) orsakað av lívshóttandi rútmuórógvi

**24.01** Ætlað ella framd skurðísetan av cardioverter defibrillator (ICD) orsakað av áður skjalprógvaðum lívshóttandi hjartarútmuórógvi ella hjartasteðgi (institio cordis).

**24.02** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin á skurðviðgerðar-degnum ella á degnum, tá tryggjaði er góðkendur á bíðilista.

**24.03** Tryggingin fevnir ikki um skurðísetan av vanligum pacemaker (kvikli).

### 26.00 Varandi nýrasvignan

**26.01** Varandi (kronisk) nýrasvignan, har bæði nýru varandi og endaliga eru hildin uppat at virka, og sum hevur ført við sær, at tørvur er á varandi dialysuviðgerð ella nýratransplantatión.

**26.02** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá varandi dialysuviðgerð er byrjað, á transplantatiónsdegnum ella á degnum, tá tryggjaði er góðkendur á aktivum bíðilista til transplantatión.

### 27.00 Størri gøgntransplantatión

**27.01** Ætlað ella framd móttøka av hjarta, lunga, livur, bris, hjarta-lunga ella hjarta-lunga-livur transplantat, orsakað av, at hesi gøgn ikki virka hjá tryggjaða.

**27.02** Tryggingin fevnir harumframt um eina framda transplantatión við upprunakyknum/mergi frá øðrum menniskja (allogen mergtransplantatión), fyri aðrar støður enn ávíst undir dekninginum fyri blóðkrabba.

**27.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin á transplantatións-degnum ella á degnum, tá tryggjaði er góðkendur á aktivum bíðilista til transplantatión.

### 28.00 Sjúka í aorta (meginlívæðrini)

**28.01** Tryggingin fevnir um sjúkur í thorakala ella abdominala partinum av aorta av slagnum;

**a)** ein total tipping av aorta (aortaokklusión),
**b)** ein bresting av aorta (aortaruptur),
**c)** ein bresting í innara aorta-lagnum og bløðing inn í aortaveggin (aortadissektión) við indikatión fyri skurðviðgerð ella
**d)** ein lokal víðkan av aorta (aortaaneurisma) við indikatión fyri skurðviðgerð (størri enn 5 cm í tvørmáti).

**28.02** Tryggingin fevnir harumframt um aortaaneurismur ella aortadissektión við skurðviðgerðarábendingum, har skurðviðgerð ikki kann gjøgnumførast av tekniskum ella øðrum orsøkum.

**28.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin á skurðvið-gerardegnum ella tá sjúkuavgerðirnar aortaaneurisma størri enn 5 cm, aortadissektión ella total aortaokklusión er skjalprógvað kliniskt og við antin ekkokardiografi ella CT/MR-skanning.

**28.04** Tryggingin fevnir ikki um sjúkur í síðugreinunum í aorta (aortas sidegrene).

# Bráðsjúkutrygging - *vaksin*

## 30.00 Multipel (disseminerað) sklerosa (MS)

**30.01** Ein varandi (kronisk) sjúka í miðnervalagnum, ið vísir seg við;

**a)** tvey ella fleiri kliniskt sundurskild tíðarskeið við neurologiskum fylgjum frá miðnervalagnum, og harafturat í minsta lagi tveir MR-ávístir løstir í miðnervalagnum, samsvarandi við MS eftir McDonald-ásetingunum ***ella***

**b)** eitt kliniskt herðindi, har tað eru tveir ella fleiri MR-ávístir løstir, samsvarandi við MS eftir McDonald-ásetingunum ella sjúkuavgjørdari dissemenering í tíð við endurtøkum av MR-skanning (monosymptomatisk MS) ***ella***

**c)** eitt langt herðindi við progressión (primær progressiv MS) við í minsta lagi tveimum MR-ávístum løstum, samsvarandi við primær progressiv MS eftir McDonald-ásetingunum.

**30.02 Tryggingin fevnir eisini um:**

**a)** Neuromyelitis optica (NMO) við bilateral opticus neuritis ella myelopati og opticus neuritis við positivari roynd fyri andevni móti aquaporin-4 í blóði saman við MR-broytingum sentralt í medulla yvir meira enn trý segmentir.

**b)** Myelin Oligodendrocyte Glycoprotein Antibody Disease (MOGAD) við MOG-andevni í blóði (MOG-IgG) saman við tveimum ella fleiri brunakendum herðindum í CNS, sum hava ført við sær varandi demyeliniserandi MR-broytingar í CNS (heila ella heilarunni). Broytingar svarandi til opticusneuritis (tvs. NMO ella NMOSD) er ikki nóg mikið.

**30.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá ein neurologisk deild ella ein serlækni í neurologi hevur staðfest sjúkuavgerðina eftir omanfyri nevndu treytum.

## 31.00 Amyotrofisk lateralsklerosa (ALS) ella aðrar líknandi progressivar ikki-arvaligar motorneuron sjúkur (MND)

**31.01** Ein varandi (kronisk) sjúka, sum stendst av áhaldandi sundurbróting av nervalagsins motorisku kyknum í mønu og heila, sum elvir til lamni, vøddasvinn og vøddakreppingar (spasticitet).

**31.02 Dekningurin er treytaður av:**

**a)** fyribrigdi við progressión av 'nedre motor neuron' sjúkueyðkennum (LMN) og 'øvre motor neuron' sjúkueyðkennum (UMN) í minsta lagi í tveimum regiónum (bulbære, overekstremitetir (cervikal),trunkus(thorakal) og undirekstremitetir (lumbosakral)) ***<u>og</u>***

**b)** abnorm uppdagan (fund) við elektromyografi (EMG) í kliniskt normalum vødda.

**31.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá ein serlækni í neurologi, sum arbeiðir í einum ALS-toymi, hevur staðfest sjúkuavgerðina klassiskt ALS.

**31.04** Tryggingin fevnir harumframt um aðrar typur av ALS og MND, treytað av, at sjúkuavgerðin er staðfest av einum serlækna í neurologi, sum arbeiðir í einum ALS-toymi:

**a)** Progressiv bulbær parese (PBP), har tað primert eru bulber sjúkueyðkenni (td. talu- og svølgtrupulleikar).

**b)** Progressivt vøddasvinn (PMA), har tað primert eru sjúkueyðkennini vøddasvinn uttan vøddakreppingar og hyperrefleksi.

**c)** Primær lateral sklerosa (PLS), har tað primert eru vøddakreppingar og hyperrefleksi, men avmarkað svinn (atrofi).

**31.05** Tryggingin fevnir ikki um arvaliga MND, herundir SMA (spinal muskelatrofi).

## 32.00 Primer Parkinsons (paralysis agitans)

**32.01** Ein varandi (kronisk) sjúka sermerkt av stívnandi vøddum (rigiditet), ristan (tremor) og viknandi spontanum rørslum (oligokinesi).

**32.02** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá ein neurologisk deild ella ein serlækni í neurologi hevur staðfest sjúkuavgerðina primer parkinsons út frá hjáveru av høvuðssjúkueyðkennunum bradykinesi/hypokinesi/akinesi (seinføri) og harafturat eitt av fylgjandi sjúkueyðkennum;

**a)** rigiditet (stívnandi vøddar) ***ella***

**b)** tremor (ristan)

**32.03 Tryggingin fevnir ikki um:**

**a)** Sekunder parkinson.

**b)** Atypisk parkinson av sløgunum progressiv supranukleær parese (PSP), multisystem atrofi (MSA), corticobasal degeneration (CBD) og Lewy Body demens.

# Bráðsjúkutrygging - *vaksin*

### 33.00 Ávísar vødda- og nervasjúkur

**33.01** Sjúkur av hesum sløgum:

**a)** Facio-/scapulo-/humeral tortrivni (dystrofi)
**b)** Limb-girdle vøddatortrivni (muskeldystrofi)
**c)** Myastenia gravis
**d)** Distal vøddasvinn (Charcot-Marie-Tooth)
**e)** Inklusiónslikamsmyositis

**33.02** Tað er ein treyt fyri útgjaldi, at sjúkuavgerðin er staðfest á neurologiskari deild ella av serlækna í neurologi og, at tað kann skjalprógvast, at sjúkueyðkennini eru byrjaði (debuteret), meðan tryggingin er í gildi.

### 34.00 Alzheimers sjúka

**34.01** Ein degenerativ heilasjúka, eyðkend av støðugt versnandi evnum at minnast, hugsa, tosa og loysa trupulleikar.

**34.02** Sjúkuavgerðin skal staðfestast eftir altjóða viðurkendum ásetingum fyri Alzheimers demens og eisini MR-skanning av heilanum, sum váttar tekin um støðugt svinnandi heilavevna (cerebral atrofi).

**34.03 Tryggingin fevnir ikki um:**

**a)** demens við rørslutrupulleikum, td. Huntingtons chorea, Parkinsons sjúka, atypisk parkinson og
**a)** demens orsakað av kálking í heilaæðrum (vaskulær demens), løsti (hjernetraumer) ella ígerð (infektion).

**34.04** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá omanfyri nevndu treytir eru uppfyltar, og ein serlækni í neurologi hevur staðfest sjúkuavgerðina Alzheimers demens.

### 35.00 HIV-ígerð, borin av blóðflutningi ella arbeiðstreytaðari smittu

**35.01** Ígerð við HIV (human immundefekt virus) sum fylgja av;

**a)** blóðflutningi ella aðrari læknaviðgerð móttikin eftir, at tryggingin er komin í gildi, treytað av, at tryggjaði hevur rætt til endurgjald frá heilsumyndugleikunum (Sundhedsstyrelsen), ***ella***
**b)** ein arbeiðstreytaður løstur ella smittuvandi á slímhinnu undir arbeiði hjá tryggjaða, hent eftir, at tryggingin er komin í gildi. Óhappið skal vera fráboðað sum arbeiðs-skaði, har negativ HIV-roynd er tikin innanfyri fyrstu vikuna eftir smittuna, og at positiv roynd er tikin innanfyri næstu 12 mánaðirnar.

**35.02** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá omanfyri nevndu treytir eru uppfyltar, og serlækni í infektiónsmedisin hevur staðfest sjúkuavgerðina HIV (human immundefekt virus).

### 36.00 AIDS

**36.01** AIDS (Acquired immunodeficiency syndrome) er ein sjúka í immunverjuni, sum fylgja av ígerð við human immundefekt virus (HIV).

**36.02** Sjúkuavgerðin skal uppfylla treytirnar hjá Sundhedsstyrelsen fyri fráboðanarskyldugt AIDS.

**36.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá omanfyri nevndu treytir eru uppfyltar og ein serlækni í infektiónsmedisin hevur staðfest sjúkuavgerðina AIDS.

**36.04** Er tryggjaði staðfestur HIV-positivur, áðrenn tryggingin kom í gildi, hevur tryggjaði ikki krav til útgjald sambært grein 10.33.

**36.05** Tryggingin fevnir ikki um tilburðir av AIDS sum fylgja av vantandi viðgerðarcompliance.

### 37.00 Veruligt blindni

**37.01** Varandi og óafturvendandi sjónarmissur á báðum eygum, har;

**a)** sýnsmegin á betra eyganum er minni enn 1/60 (0,01666) ***ella***
**b)** sjónarvíddin hægst er 10 gradir á betra eyganum ***ella***
**c)** sýnsmegin er 6/18 ella minni á betra eyganum, og sjónarvíddin samstundis er 20 gradir ella minni.

**37.02** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá omanfyri nevndu treytir er uppfyltar, og sjúkuavgerðin er staðfest av serlækna í eygnasjúkum.

# Bráðsjúkutrygging - *vaksin*

## 38.00 Totalur deyvleiki

**38.01** Totalur varandi og óafturvendandi missur av hoyrn í báðum oyrum, við hoyrigátt á 90-100 db ella meira á øllum frekvensum.

**38.02** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá omanfyri nevndu treytir kunnu skjalprógvast av serlækna í oyrnasjúkum.

**38.03** Tryggingin fevnir harumframt um deyvblivin, viðgjørd við cochleaimplantat ella implantat á heilarunni, treytað av, at omanfyri nevndu ásetingar við einum totalum varandi og óafturvendandi missi av hoyrnini var uppfylt áðrenn implantatviðgerðina.

## 39.00 Størri brunasár av 3. ella 4. stigi (ambustio)

**39.01** Størri brunasár á triðja ella fjórða stigi, íkomin av eldi, hita, etsing, stráling ella frosti, ið umfatar í minsta lagi 20% av yvirflatuni av kroppinum hjá tryggjaða.

**39.02** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá omanfyri nevndu treytir eru uppfyltar, og sjúkuavgerðin er skrivað í journalin frá viðgerandi deild fyri brunasár.

## 40.00 Varandi neurologiskar fylgjur eftir bruna í heila- ella heilahinnum, neuroborreliosa og Tick-Borne-Encephalitis (TBE)

**40.01** Ígerð í heila, heilanervarótum ella heilahinnum orsakað av bakterium, vira, soppum ella øðrum mikrobum, sum hevur ført við sær varandi objektivar neurologiskar fylgjur sum lamni, føli-, sjónar- ella taluórógv, svarandi til 8% mein eftir meintalvuni hjá Arbejdsmarkedets Erhvervssikring. Kenslubornar fylgjur, kognitivur ampi, høvuðpína ella møði er ikki fevnt av tryggingini.

**40.02** Sjúkuavgerðirnar heila- ella heilahinnubruni skulu vera staðfestar út frá;

**a)** ávísing av mikrobum í mønuflotinum (cerebrospinalvæsken) ***ella***

**b)** ávísing av týðiligari brunakendari reaktión (pleocytose) í mønuflotinum við hækkaðum tali av hvítum blóðlikamum, eventuelt suppleråð við CT- ella MR-skanning.

**40.03** Sjúkuavgerðin neuroborreliosa skal vera staðfest við;

**a)** ávísing av týðiligari brunakendari reaktión (pleocytose) í mønuflotinum við hækkaðum tali av hvítum blóðlikamum ***og***

**b)** positivari intrathekal antistofsyntesu við IgM ella IgG í mønufloti.

**40.04** Sjúkuavgerðin Tick-Borne-Encephalitis (TBE) skal vera staðfest við;

**a)** ávísing av TBE-serstøkum IgM og IgG andevnum í blóði ella mønufloti.

**40.05** Harafturat eru heilasvullir (hjerneabscesser) umfataðir, treytað av, at sjúkuavgerðin er staðfest við CT- ella MR-skanning, og tað er ávíst mikrobur í aspiratinum í svullunum.

**40.06** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá omanfyri nevndu treytir eru uppfyltar og fylgistøðan verður mett rímiliga støðug av einum serlækna í neurologi ella infektiónsmedisini. Hetta merkir, at varandi neurologisku fylgjurnar, í ávísum føri, í fyrsta lagi kunnu metast um 3 mánaðir eftir kanningina av mønuflotinum, sum ávísti bruna í heila- ella heilahinnum, neuroborreliosu ella Tick-Borne-Encephalitis.

## 41.00 Creutzfeldt-Jakobs sjúka (CJD og vCJD)

**41.01** Ein progressiv degenerativ sjúka í miðnervalagnum, samsvarandi við subakut spongiform encefalopati (CJD) ella variant CJD.

**41.02** Sjúkuavgerðin skal vera staðfest á relevantari sjúkrahúsdeild, og mett sannlík út frá typiskum kliniskum sjúkueyðkennum, við støðugt versnandi demens, ávirkaðari koordinatión, niðursettari sjón, ávirkaðari talu, stirvni vm.

**41.03** Harafturat skal sjúkuavgerðin vera grundað á;

**a)** positiv real-time quaking-induced conversion (RT-QuIC) roynd á mønuflotinum ***ella***

**b)** relevantum broytingum á MR-skanning og EEG ***saman við*** týðiligt hækkaðum tau/fosfo-tau-ratio (yvir 30) og 14-3-3 protein í mønuflotinum.

# Bráðsjúkutrygging - børn

## E. Nærri lýsing av bráðsjúkunum fyri børn

### 115.00 Krabbamein – undantikið minni ágangandi sløg

**115.01** Illkynjaður (malignur) svullur (tumor), har sjúkuavgerðin er staðfest histologiskt, sermerktur við ótálmaðum vøkstri av illkynjaðum kyknum, sum hevur lyndi til at spreiða seg inn í vevnaðin uttanum og hevur lyndi til lokalt afturstig (recidiv) og harumframt eisini lyndi til at spreiða seg til aðrar lymfueitlar og onnur gøgn (metastasur).

**115.02** Tryggingin fevnir harumframt um svullir í gróðrarkyknum (kimcelletumorer), neuroblastom, retinoblastom, Langerhans kyknu histiocytosa (histiocytosis X) og ágangandi fibro matosa, tá stráluviðgerð ella  kyknudrepandi viðgerð er byrjað (íroknað kemoviðgerð og aðrar málrættaðar (targeteret) krabbameinsviðgerðir).

**115.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá ein serlækni í vevnaðarkanningum (patologi) hevur staðfest sjúkuavgerðina grundað á histologiska kanning av tumorvevnaðinum.

**115.04 Tryggingin fevnir ikki um:**

**a)** Svullir flokkaðir á byrjunarstigi, non-invasivir, karcinom in situ, dysplasi, borderline ella við lágum illkynjaðum menningarmøguleikum (uttan mun til, hvør viðgerð er vald).

**b)** Øll sløg av húðkrabba (íroknað lymfomir og sarkomir í húðini) og móðurmerkjakrabbi á stigi 0 og 1A (malignt melanom).

**c)** Neuroendokrinir (karcinoide) svullir uttan lyndi til spreiðing inn í vevnaðin uttanum ella metastasur.

### 116.00 Krabbamein í blóði, lymfu og blóðgerandi kyknunum í merginum – undantikið minni ágangandi (indolent) sløg

**116.01** Illkynjað (malign) sjúka íkomin í blóði, lymfu ella blóðgerandi kyknunum í merginum, eyðkend við atypiskum blóðbílæti við ótálmaðum vøkstri av blóðkyknum og lyndi til progressión og afturstig (recidiv).

**116.02 Tryggingin fevnir um:**

**a)** Akut leukæmi (AML og ALL).

**b)** Kronisk myeloid leukæmi (CML).

**c)** Myelomatose/solitært myelom og Waldenströms makroglobulinæmi.

**d)** Non-Hodgkins lymfom, ***undantikið*** minni ágangandi sløg sum; lokaliserað MALT lymfom, mycosis fungoides á plaque-stigi og húðlymfomir sum lokaliserað CD30 positivt lymfom og kutant B-kyknu lymfom lokaliserað til húðina.

**e)** Hodgkins lymfom á II til IV stigi.

**f)** Myelodysplastisk syndrom (MDS) við høgum váða (højrisiko).

**g)** Kronisk myelomonocytær leukæmi (CMML).

**116.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá serlækni í vevnaðarkanningum (patologi) hevur kannað og staðfest sjúkuavgerðina grundað á histologiskar ella cytologiskar kanningar, og hartil møguligar mýlalívfrøðisligar (molekylærbiologisk) upplýsingar grundaðar á blóð og merg.

**116.04 Tryggingin fevnir eisini um viðgerðarkrevjandi*:**

**a)** Kronisk lymfatisk leukæmi (CLL)/ småcellet lymfocytært lymfom (SLL).

**b)** Essentiel trombocytosa.

**c)** Polycytæmia vera.

**d)** Myelofibrosa.

*Viðgerðarkrevjandi merkir kyknudrepandi viðgerð (íroknað kemoviðgerð og aðrar málrættaðar (targeteret) krabbameinsviðgerðir) ella stráluviðgerð og eisini transplantatión við upprunakyknum (autolog mergtransplantatión) ella mergi frá øðrum gevara (allogen mergtransplantatión).

**116.05** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá serlækni í vevnaðarkanningum (patologi) hevur kannað og staðfest sjúkuavgerðina grundað á histologiskar ella cytologiskar kanningar, og hartil møguligar mýlalívfrøðisligar (molekylærbiologisk) upplýsingar grundaðar á blóð og merg – ***og*** tað frá onkologiskari ella hematologiskari deild er skrivað í journalin, at tað er viðgerðarindikatión fyri kyknudrepandi viðgerð, stráluviðgerð ella transplantatión av upprunakyknum ella mergi frá gevara.

# Bráðsjúkutrygging - *børn*

**116.06 Tryggingin fevnir ikki um:**

**a)** Byrjunarstøður til krabbamein í blóði, lymfu og blóðgerandi kyknunum í merginum.

**b)** Lymfomir staðbundin til húðina.

**c)** Monoklonal gammopati (MGUS).

### 117.00 Ávísir góðkynjaðir og minni ágangandi svullir í heila ella mønu

**117.01** Góðkynjaður ella minni ágangandi (stig 1-2) svullur (tumor) íkomin og sprottin frá heila, heilarunni, mønu ella í hinnum hjá hesum gøgnum (miðnervalagið).

**117.02** Dekningurin er treytaður av, at tilburðurin hevur ført við sær munandi objektivar neurologiskar fylgjur (td. dysfunktión og niðursettar førleikar) svarandi til í minsta lagi 10% mein eftir meintalvuni hjá Arbejdsmarkedets Erhvervssikring. Kenslubornar fylgjur, kognitivur ampi, høvuðpína ella møði er ikki fevnt av tryggingini.

**117.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá ein neurologisk ella neurokirurgisk deild hevur staðfest sjúkuavgerðina og ein serlækni í neurologi hevur váttað objektivu neurologisku fylgjurnar og útilokað aðrar orsøkir til fylgjurnar.

**117.04** Tað er ein treyt, at sjúkuavgerðin er staðfest aftaná, at barnið er føtt.

**117.05 Tryggingin fevnir ikki um:**

**a)** Svullir í skalla-/heilanervum ella spinalnervum (herundir Schwannomir/neurinomir).

**b)** Granulomir ella isoleraðar cystur uttan maligna patologi.

**c)** Hypofysuadenomir.

### 118.00 Heilabløðing ella blóðtøppur í heilanum (apopleksi)

**118.01** Brádligt (akutt) íkomin løstur í heila ella heilarunni orsakað av órógvi í blóðrenslinum í heilanum (apopleksi), sum antin stavar frá;

**a)** eini treinging ella typping av eini lívæðr (pulsåre) íkomin í heilanum orsakað av trombosu ella emboli, og samstundis íkomin objektiv neurologisk sjúkueyðkenni, sum hava verið tilstaðar í meira enn 24 tímar, ***ella***

**b)** ein spontant ella traumatiskt íkomin bløðing í heilanum ella millum heilahinnurnar, og samstundis íkomin objektiv neurologisk sjúkueyðkenni.

**118.02 Dekningurin er treytaður av;**

**a)** at tilburðurin er skjalprógvaður við heilaskanning (CT/MR) ***og***

**b)** at tilburðurin hevur ført við sær varandi neurologiskar fylgjur (kann í fyrsta lagi  metast eftir ein mánaða) so sum lamni, niðursetta styrki ella sensibilitet, talu- ella sjónarórógv svarandi til heilaskaðan, sum er ávístur við heilaskanning.
Kenslubornar fylgjur, kognitivur ampi, høvuðpína ella møði er ikki fevnt av tryggingini.

**118.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá neurologisk ella neurokirurgisk deild hevur staðfest sjúkuavgerðina apopleksi ***og*** serlækni í neurologi hevur váttað varandi neurologisku fylgjurnar, og samstundis hevur útilokað aðrar orsøkir til neurologisku fylgjurnar.

**118.04** Tryggingin fevnir eisini um órógv í blóðrenslinum í heilanum (cerebrale cirkulationsforstyrrelser) hjá barninum undir føðing, sum hevur ført við sær varandi rørslubrek orsakað av heilaskaða (cerebral parese), við sermerktu sjúkueyðkennunum vøddakreppingar, rørsluórógv, vøddaveikleiki, ataksi og stívnandi vøddar (rigiditet).

**118.05 Tryggingin fevnir ikki um:**

**a)** Skjótt forbí farandi blóðtøppar (transitorisk cerebral iskæmi (TCI/TIA)).

**b)** Áður hent heilainfarkt ávíst við heilaskanning (CT/MR).

**c)** Blóðtøppar ella bløðingar í útryðjuni (perifere) av nervavevnaðinum, tað vil siga uttan fyri heilan (t.d. í eygunum, oyrunum, hypofysuni).

### 119.00 Posi á lívæðr í heilanum (aneurisma) ella karvanskapan inni í heilanum (AV-malformatión ella kavernøst angiom) – har tørvur er á skurðinntrivi

**119.01** Framt endovaskulert ella annað kirurgiskt inntriv vegna brek í æðrum í heilanum orsakað av;

**a)** einum ella fleiri posum á lívæðrum í heilanum ***ella***

**b)** arteriovenøs karvanskapan (karmisdannelse) ***ella***

**c)** kavernøst angiom

**119.02** Sjúkuavgerðin skal verða staðfest á neurologiskari ella neurokirurgiskari deild, og sjúkuavgerðin verður mett sum tikin á skurðviðgerðardegnum.

# Bráðsjúkutrygging - børn

**119.03** Dekningurin er treytaður av, at brekið er skjalprógvað við myndum (CT- ella MR-skanning) og viðgerðin er framd aftaná, at barnið er føtt.

**119.04** Tryggingin fevnir harumframt um tilburðir, har tørvur er á kirurgiskum inntrivi, men viðgerðin ikki kann gjøgnumførast av tekniskum ella øðrum orsøkum (td. aldri).

### 120.00 Ring (kompleks) hjarta- ella aortasjúka, har tørvur er á skurðinntrivi, og tilburðir har tørvur er á betran av pumpu- ella rútmufunktión í hjartanum við ísetan av framkomnari pacemaker-skipan ella ICD

**120.01** Framt endovaskulert ella annað kirurgiskt inntriv orsakað av:

- **a)** Brek (misdannelser) í uppbygnaðinum í hjartanum ella hjartalokum.
- **b)** Viðføtt treinging í aorta (coarctatio aortae) og transposition av stóru lívæðrunum aorta og arteriea pulmonalis (TGA).
- **c)** Skurðísetan av defibrillator (ICD-eind) og eisini framkomnari pacemaker-skipan, sum kann betra pumpu- ella rútmufunktiónina í hjartanum (herundir biventrikulær pacemaker (CRT-eind), trý-kamars pacing ella resynkroniseringsterapi).

**120.02** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin á skurðviðgerðardegnum, og skal staðfestast á kardiologiskari ella thoraxkirurgiskari deild.

**120.03** Dekningurin er treytaður av, at viðgerðin er framd aftaná, at barnið er føtt.

**120.04** Tryggingin fevnir harumframt um tilburðir, har tørvur er á kirurgiskum inntrivi, men viðgerðin ikki kann gjøgnumførast av tekniskum ella øðrum orsøkum (td. aldri).

**120.05** Tryggingin fevnir ikki um aðrar hjartarútmusjúkur ella aðrar sjúkur í hjartavøddanum (hjertemuskulaturen).

### 121.00 Varandi nýrasvignan

**121.01** Varandi (kronisk) nýrasvignan, har bæði nýru varandi og ikki afturtakandi eru hildin uppat at virka, og sum hevur ført við sær, at tørvur er á varandi dialysuviðgerð ella nýratransplantatión.

**121.02** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá varandi dialysuviðgerð er byrjað, á transplantatiónsdegnum ella á degnum, tá barnið er góðkent á aktivum bíðilista til transplantatión.

### 122.00 Størri gøgntransplantatión

**122.01** Ætlað ella framd móttøka av hjarta, lunga, livur, bris, hjarta-lunga ella hjarta-lunga-livur transplantat, orsakað av, at hesi gøgn ikki virka hjá barninum.

**122.02** Tryggingin fevnir harumframt um eina framda transplantatión við upprunakyknum/mergi frá øðrum menniskja (allogen mergtransplantatión), fyri aðrar støður enn ávíst undir dekninginum fyri blóðkrabba.

**122.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin á transplanta-tiónsdegnum ella á degnum, tá barnið er góðkent á aktivum bíðilista til transplantatión.

### 123.00 Multipel (dissemineráð) sklerosa (MS)

**123.01** Ein varandi (kronisk) sjúka í miðnervalagnum, ið vísir seg við;

- **a)** tvey ella fleiri kliniskt sundurskild tíðarskeið við neurologiskum fylgjum frá miðnervalagnum, og harafturat í minsta lagi tveir MR-ávístir løstir í miðnervalagnum, samsvarandi við MS eftir McDonald-ásetingunum ***ella***
- **b)** eitt kliniskt herðindi, har tað eru tveir ella fleiri MR-ávístir løstir, samsvarandi við MS eftir McDonald-ásetingunum ella sjúkuavgjørdari disseminering í tíð við endurtøkum av MR-skanning (monosymptomatisk MS) ***ella***
- **c)** eitt langt herðindi við progression (primær progressiv MS) við í minsta lagi tveimum MR-ávístum løstum, samsvarandi við primær progressiv MS eftir McDonald-ásetingunum.

**123.02 Tryggingin fevnir eisini um:**

- **a)** Neuromyelitis optica (NMO) við bilateral opticus neuritis ella myelopati og opticus neuritis við positivari roynd fyri andevni móti aquaporin-4 í blóði saman við MR-broytingum sentralt í medulla yvir meira enn trý segmentir.
- **b)** Myelin Oligodendrocyte Glycoprotein Antibody Disease

# Bráðsjúkutrygging - *børn*

(MOGAD) við MOG-andevni í blóði (MOG-IgG) saman við tveimum ella fleiri brunakendum herðindum í CNS, sum hava ført við sær varandi demyeliniserandi MR-broytingar í CNS (heila ella heilarunni). Broytingar svarandi til opticusneuritis (tvs. NMO ella NMOSD) er ikki nóg mikið.

**123.03** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá ein neurologisk deild ella ein serlækni í neurologi hevur staðfest sjúkuavgerðina eftir omanfyri nevndu treytum.

### 124.00 HIV-ígerð ella AIDS (Acquired immunodeficiency syndrome)

**124.01** HIV-ígerð við ávístum andevni móti HIV-virus við hjálp frá ELISA og eisini ein váttað kanning við Western blot teknikki.

**124.02** Tryggingin fevnir eisini um sjúkuavgerðina AIDS (HIV kliniskt stadium C), treytað av, at sjúkuavgerðin uppfyllir treytirnar hjá Sundhedsstyrelsen fyri fráboðanarskyldugt AIDS, og at sjúkuavgerðin er staðfest av serlækna í infektiónsmedisin.

### 125.00 Veruligt blindni

**125.01** Varandi og óafturvendandi sjónarmissur á báðum eygum, har;

**a)** sýnsmegin á betra eyganum er minni enn 1/60 (0,01666) ***ella***
**b)** sjónarvíddin hægst er 10 gradir á betra eyganum ***ella***
**c)** sýnsmegin er 6/18 ella minni á betra eyganum, og sjónarvíddin samstundis er 20 gradir ella minni.

**125.02** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá omanfyri nevndu treytir er uppfyltar, og sjúkuavgerðin er staðfest av serlækna í eygnasjúkum.

### 126.00 Totalur deyvleiki

**126.01** Totalur varandi og óafturvendandi missur av hoyrn í báðum oyrum, við hoyrigátt á 90-100 db ella meira á øllum frekvensum.

**126.02** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá omanfyri nevndu treytir kunnu skjalprógvast av serlækna í oyrnasjúkum.

**126.03** Tryggingin fevnir harumframt um deyvblivin, viðgjørd við cochleaimplantat ella implantat á heilarunni, treytað av, at omanfyri nevndu ásetingar við einum totalum varandi og óafturvendandi missi av hoyrnini var uppfylt áðrenn implantatviðgerðina.

### 127.00 Størri brunasár av 2. ella 3. stigi (ambustio)

**127.01** Størri brunasár á øðrum ella triðja stigi, íkomin av eldi, hita, etsing, stráling ella frosti, ið umfatar í minsta lagi 10% av yvirflatuni av kroppinum hjá barninum.

**127.02** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá omanfyri nevndu treytir eru uppfyltar og sjúkuavgerðin er skrivað í journalin frá viðgerandi deild fyri brunasár.

### 128.00 Varandi neurologiskar fylgjur eftir bruna í heila- ella heilahinnum, neuroborreliosa og Tick-Borne-Encephalitis (TBE)

**128.01** Ígerð í heila, heilanervarótum ella heilahinnum orsakað av bakterium, vira, soppum ella øðrum mikrobum, sum hevur ført við sær varandi objektivar neurologiskar fylgjur sum lamni, niðursetta hoyrn ella sjón, taluórógv ella hydrocefalus, svarandi til mein á 8% ella meira mett av serlækna í neurologi, eftir meintalvuni hjá Arbejdsmarkedets Erhvervssikring. Kenslubornar fylgjur, kognitivur ampi, høvuðpína ella møði er ikki fevnt av tryggingini.

**128.02** Sjúkuavgerðirnar heila- ella heilahinnubruni skulu vera staðfestar út frá;

**a)** ávísing av mikrobum í mønuflotinum (cerebrospinalvæsken) ***ella***
**b)** ávísing av týðiligari brunakendari reaktión (pleocytose) í mønuflotinum við hækkaðum tali av hvítum blóðlikamum, eventuelt suppleráð við CT- ella MR-skanning.

**128.03** Sjúkuavgerðin neuroborreliosa skal vera staðfest við;

**a)** ávísing av týðiligari brunakendari reaktión (pleocytose) í mønuflotinum við hækkaðum tali av hvítum blóðlikamum ***og***
**b)** positiv intrathekal antistofsyntesa við IgM ella IgG í mønufloti.

# Bráðsjúkutrygging - *børn*

**128.04** Sjúkuavgerðin Tick-Borne-Encephalitis (TBE) skal vera staðfest við;

**a)** ávísing av TBE-serstøkum IgM og IgG andevnum í blóði ella mønufloti.

**128.05** Harafturat eru heilasvullir (hjerneabscesser) umfataðir, treytað av, at sjúkuavgerðin er staðfest við CT- ella MR-skanning, og tað er ávíst mikrobur í aspiratinum í svullunum.

**128.06** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá omanfyri nevndu treytir eru uppfyltar og fylgistøðan verður mett rímiliga støðug av einum serlækna í neurologi ella infektiónsmedisini. Hetta merkir, at varandi neurologisku fylgjurnar, í ávísum føri, í fyrsta lagi kunnu metast um 3 mánaðir eftir kanningina av mønuflotinum, sum ávísti bruna í heila- ella heilahinnum, neuroborreliosu ella Tick-Borne-Encephalitis.

### 129.00 Ringt viðgerðarkrevjandi generaliserað epilepsi

**129.01** Tryggingin fevnir um tilburðir, har tað hava verið í minsta lagi tvey generaliserað epileptisk herðindi við tilvitsávirkan (grand mal), sum havaført við sær varandi medisinska viðgerð.

**129.02** Sjúkuavgerðin verður mett sum tikin, tá ein neurologisk deild ella ein serlækni í neurologi hevur staðfest sjúkuavgerðina grundað á í minsta lagi tvey sermerkt generaliserað epileptisk herðindi og eisini EEG samsvarandi við epilepsi.

### 130.00 Trygging við deyða

**130.01** Doyr barnið, meðan tryggingin er í gildi, verður ein upphædd útgoldin, einsljóðandi tryggingarupphæddina fyri bráðsjúku til børn, sum er ásett í tryggingaravtaluni.

**130.02** Hevur barnið fingið staðfest eina bráðsjúku, sum er fevnd av treytunum, er tað ein treyt fyri útgjaldi við deyða, at tað eru gingnir í minsta lagi 6 mánaðir millum dagin, tá sjúkuavgerðin er staðfest, og dagin, tá barnið doyði.

**130.03** Tryggingarupphæddin verður útgoldin til tryggjaða, og einki arvaavgjald skal rindast. Tað ber ikki til at áseta tilskilan.